# FINNUR HELMSDAL –

## lívlátin er kompromis




*HB-liðið sum vann steypakappingina í 1976, Finnur Helmsdal stendur uttastur til vinstru*

*Tórbjørn Jacobsen*

Tað var eitt vónríkt lið av ungum og eldri politikkarum, sum mannaðu tingbólk Tjóðveldisins, táið vit í 1998 høvdu skipað fullveldislandsstýrið og ítøkiliga fóru undir at virka fyri teimum frælsu Føroyum. Annað og triðja ættarliðið eftir tjóðskaparpolitiska vitan Erlend Patursson og valaliðið í hansara meingi. Tíggju ár seinri er hetta onnur ferðin, at vit bera ein teirra út á seinasta leiðið. Fyrst Finnbogi og nú Finnur. Fyrst hin royndi og durkdrivni pragmatikarin, sum vísti okkum torgingnu loynistíggjarnar og legði okkum lag á og nú sosialpolitiski chefideologurin par exellance, ið var so lívsneyðugur ítjóðskaparpolitiskustrembanini. Finnur endurvann Tjóðveldinum eitt sosialt andlit, tað kendist næstan, sum at maður og profilur gingu saman í eitt. Kanska eitt ættarbregði.

Finnur Helmsdal var alkendur maður. Tað tykist, sum hevur hann altíð verið til, tí heilt frá ungum árum hevur hann verið frammi í almenna ljósinum, í ymsum høpum. Kendi hann heilt frá barni av, táið eg tíðum vitjaði mostir mína á Tinghúsvegnum og seinri í Hoydølum og hesi seinastu árini á politiska pallinum, har vit eru farnir ígjøgnum manga íðuna saman, samdir og ósamdir, men felagsfatanin í stórum málum var ekvivalent, eisini tí skeiklaðist vinskapurin ongantíð, hóast tað mangan øtlaði og var rusk í sjónum. Temperamentið hjá báðum stóð manga royndina, skal sigast.

Hann var sonur Oliviu, sum var slektað úr Miðvági og landsverkfrøðingin Mikkjal. Ein av mongum ungum føroyingum, ið setti sær fyri at byggja landið eftir stríðsárini. Við ófatiliga víðskygninum og eini ómetandi framskrúvu, runnu stovnurin og maðurin saman í eitt. Ein bræðin institutión. At oddviti á slíkum stovni megnar at leggja eina heila tjóð í eitt infrastruktuelt kervið, í egnari starvstíð, man vera eindømi í heiminum, og boðar frá megi, visiónum og eini mentalari styrki, ið sigur spar tvey til alt annað, og sum hevur staðið upp ímóti uppganginum frá fleiri ættarliðum av politikkarum. Drangur í brimi.

At vera sonur ein so máttmiklan stovn er ikki bara lætt. Sakførarin Carl Madsen hevur lýst hetta fyribrigdið so væl í endurminningum sínum. Hetta skismaði. Spenningarnar. Tvídráttin. Dialektikkina. Í hansara føri, táið bóndin og íhaldni vinstramaðurin ikki skilir, at sonurin gerst sakførari og kommunistur. Onkursvegna stendur tú í mun til upphavið, líkamikið hvat tú annars velur at takast við her í lívinum. Finnur miðaði av nýggjum, fótaði sær væl og vegaði rás á øðrvísi stíggjum. Við sínum góða forstandi gekk leiðin niðan í Hoydalar, har Erik og Haraldsen og aðrar góðar kreftir royndu at temja hendan krappa og bráðræsna ungdómin, við teimum nógvu eyðsýndu talentunum.

Tey flestu minnast hann frá leikvøllunum kring landið og uttanlands. Stórur, langlimaður, skjótur. Góða skotstyrki við trivaligu skøvningunum. Íðin og kompromisleysur. Frísuta hárið flákraði í ferðini, og einaferð sigst, at hann í eini infight, í hondbóltslandsdysti, skrædlaði sær lógvarnar so illa, at blóðið dreiv úr beninum, men tað forðaði honum ikki í at streva víðari fram fyri heiðurinum og tjóðini. Vit minnast hann ikki bara tí, at hann plagdi leika í hálvhosum, eitt slag av pátrúgv sigst, sum fleiri tá høvdu ælið á seg, og er einasti føroyingurin, sum hevur spælt ein landsdyst í skipstroyggju, í hondbólti, men heldur tí, at hann revolutioneraði spælið onkursvegna. Serliga fótbóltin. HB fekk nógv burturúr honum í tíðini, táið spælið var í serliga stórari menning, um tað mundið táið Pelé og Cruyff vóru uppi á døgum og kanska serliga Beckenbauer defineraði spælið av nýggjum. Liberoin – aftasti maðurin – stabiliteturin – strategurin - sum savnar upp og stingur út í kortið av nýggjum. Skipar rangstøðuna hjá mótstøðuliðnum, vit plagdu at arga hann við, at hann uppfann felluna, og ger eina reina glíðandi takling, har hon krevst. Soleiðis minnast vit Finn, og soleiðis dugnaði hann barndómsfelagnum í mong ár. Á fyrstu parkett. Í broddi fylkingar. Í hondbóltinum kom hann at spæla saman við frægastu leikarum okkara, síðani spælið kom higar til lands, og eisini har hevur hann fylt upp í kyndilsskápini skínandi steyparúgvir. Hann var gjøgnumbrotssterkur álopsspælari og rættiliga stinnur verjuleikari. Táið hann var í lestrarørindum í Esbjerg spældi hann við besta liðnum hjá Kvik, sum var frammalaga í næstfremstu deildini í Danmark tey árini. Landsliðini hava eisini verið leskað við hansara ásýniligu dygdum. Og kanska guvaði ein stór borðtennisstjørna burtur í tíðarmeldrinum, tað heldur í hvussu er the grand old man av Tvøroyri, Sverri Midjord, sum í seinasta valskeiði var kollegi hansara á tingi.

Appropos landsverkfrøðingsstovnurin, ella stovnar yvirhøvur, so kom Finnur at vaksa upp í hesi merkiligu tíðini, sum ongin annar nakrantíð kemur at uppliva, enn júst tað ættarliðið, sum var í besta blóma, táið ungdómsbyltingin stóð í vøkstri, og fór sum ein grasfløtubrandur um allan vesturheimin. Uppreisturin móti autoritetunum. Stadnaðu stovnunum. Og vit eru ivaleyst mong, sum minnast hendan høgleitta mannin í havnargøtum, við eyðkendum fjakkandi síðum hári, víðum brókum og palestina turriklæði. Ein sjarmerandi fýrur við tí eitt sindur nonchalentu attituduni, sum var so vanlig tá. At síggja til, eitt slag av einum bohemi. Ómetaliga vinsælur táið vit hittust í havnargøtum, hevði altíð stundir til eitt prát. Ella ein kaffisopa inni á Kondittarínum. Eisini, hóast tað tíðum var langt ímllum, serliga eftir at mann var farin til skips. Ein serliga karismatiskur maður, sum hevði greið sjónarmið um stóru og smáu samfelagsmálini. Ein gjørdur politikkari. Hann gjørdi upp við klassiska rákið, at elta fótasporini hjá undanfarnum ættarliðum, og setti sær fyri, av hugsjónaðarligari drívmegi og hjarta, at dugna tí veikara partinum av samfelagnum. Sum avlærdur sosialráðgevi virkaði hann í mong ár í almannaverkinum m.a. saman við legenduni Klaus Hermann, maðurin, sum fakliga hevði hægstu tign í hugaheimi hansara. Við tí viðførinum fór hann ígjøgnum skipanina, og til endans gjørdist hann leiðari á Barnaheimi Føroya. Sum skyldkonan hjá konuni fekk at renna upp úr turrari jørð frá byrjan.

Samfelagsviðurskifti høvdu yvirhøvur hansara stóra áhuga. Serliga korini hjá teimum, sum onkursvegna ikki eru so væl útborin, at tey megna at standa uppi av sær sjálvum, í einum heimi hvørs ferð bara tekur alt meira dik á seg. Ein materiellur galopperandi gangari, sum ikki hakar í nakrastaðni. Sum slettir øll tey minni treystu úr leypinum á alfaravegi. Tí kom tað neyvan óvart á nakran, at maðurin fór at snodda til politisku skipanina, og sum vinstrahallur nationalistur, varð tað sjálvsagt, at hann valdi Tjóðveldisflokkin sum botn, fundament, í sínum virki. Fyrstu royndirnar vórðu gjørdar í býráðnum í Havn og táið fullveldis-